VI‹MERKINGAR

250 n‡ ggj dagstovnapláss samtykt

Elin Lindenskov
B‡rá›slimurwww.lindenskov.com

Á b‡rá›sfundi í sí›stu viku samtykti b‡rá›i› at hækka játtanina til barnagar›søki› til ta› dupulta.

Í sí›stu viku var› fíggjarætlanin hjá Tórshavnar Kommunu endaliga vi›gjørd og samtykt. Í henni var samtykt at seta 81 milliónir av til barnagar›søki› í 2001. Ta› er næstan ta› dupulta so nógv, sum var› avsett í ár. Tali› í ár er 46 milliónir. Hetta merkir, at vi› teimum 52 plássunum, sum koma fyrsta dagin, fáa umlei› 250 børn afturat ansingartilbo› á›renn 2001 er li›ugt.

- Fyrsta stigi› er nú tiki› til at fáa hundra› prosent barnaansing í 2003 í Tórshavnar Kommunu.

- Hóast ta› hevur veri› stríggi› at koma fram til hetta úrsliti›, so eri eg sera gla› fyri at hava fingi› so gó›a undirtøku fyri fyrsta stiginum. Og eg vóni, at hetta fer at sannføra tey, sum eru ivandi um, at hundra› prosent barnaansing ikki bert eru tóm vallyfti, men ein væl gjøgnumhugsa› ætlan.

- Næstu stigini skal næsta b‡rá› taka. Tí er ta› avgerandi hesafer› at velja fólk í b‡rá›i›, sum taka undir vi› at barnaansingarmáli› skal loysast fult út. Ætlanin er klár til 2002 og 2003, men ta› skulu eisini fólk til at samtykkja hesi stigini.

- Nú havi eg siti› í b‡rá›num í átta ár. Sí›ani tá er nógv broytt. Tá var pedagogur eitt skelsor_ og stó› ikki í l‡singunum hjá Tórshavnar b‡rá›. Í dag er hetta sjálvsagt. Og vit seta nú sum eitt realistiskt mál at

fáa hundra› prosent barnaansing. Hetta má sigast at vera ein ómetaliga stór broyting, sum Javna›arflokkurin og fólk, sum velja Javna›arflokkin, hava fingi› ígjøgnum. Lati› okkum nú vi› dyggum stu›li tryggja, at ta› ver›ur Javna›arflokkurin, sum eisini førir ætlanina á mál.

Tey 52 plássini koma sum afturat nú eru:

Útibarnagar›urin í Framhúsinum 16 børn. Lat upp 1. november 2000.

B‡lingshúsi› millum Gilja 20 børn. Lat upp 1 november 2000.

Útibarnagar›urin á Hvítanesi 16 børn. Byrjar 20 november. 2000.

Tey 200 plássini sum koma í næsta ár eru:

Útibarnagar›urin í Skótahúsi Sigmund Brestirsonar. 20 børn byrja 2 januar. 2001. B‡lingshúsi› á Ternuryggi. 20 børn byrja 2 januar 2001. N‡ggjur Dagstovnur vi› Landavegin 60 børn byrja summar 2001. Dagstovnur í Kaldbak ella Argjum uml. 30 børn. Bussbarnagar›ur umlei› 20 børn. Dagstovnur hjá fyritøku 30 børn. Frítí›arskúli í Kollafir›i 20 børn.

Javna›arcafèin á Tvøroyri

Martin S. Eidesgaard

Javna›arcafèin á Tvøroyri læt upp fríggjadagin í Snaruni og hevur havt opi› allar dagarnar fram til valdagin.

Valevni og onnur álitisfólk skiftast um at práta vi› og taka ímóti vitjandi.

Í dag, valdagin, letur upp kl. 10.00 og ver›ur opi› út á kvøldi›.

Vinarligar heilsanir.

Listaframs‡ ning

Ey›un av Reyni, listama›ur, lat upp listaframs‡ning á torginum í Snarskivuni í glamla posthúsinum mikudagin 15. november 2000. Á frams‡ningini eru 15 oljumálningar, i› allir eru til sølu.

Frams‡ningin er opin somu tí›ir sum Snarskivan, t.v.s. mánadag-fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag 9-18. Frams‡ningin hjá Ey›uni av Reyni endar sí›st í desember 2000.

Gó›i borgari í Tórshavnar Kommunu

Tórfinn Smith
b‡rá›slimur og valevni

Í Havn, á Hvítanesi, í Kaldbak, í Nor›adali, í Sy›radali, á Argjum og í Kollafir›i

Aftur til hetta b‡rá›svali› finnur tú meg á Javna›arlistanum, og nú sum á›ur, fari eg at leggja alla orku í at fremja ein tryggan og framtakshuga›an fíggjarpolitikk, sum skal tryggja

frambur› og trivna› fyri øll. At øll mál fáa eina reella, sakliga og skjóta málsvi›ger›. At útbyggingar ver›a ra›festar í langtí›ar-ætlanum. At planlegging fer at rá›a heldur enn tilvild.

Ta› er líti› at ivast í, at fólk kunnu vera ymisk á máli um hvussu hesi seinastu f‡ra árini hava vignast. Ávís mál eu rokkin, og í ø›rum førum mugu vit ásanna, at ta› hevur gingi› meira strilti›. Vit kunnu tó ongantí› siga, at nú eru vit komin á mál. Heimurin stendur ikki í sta›, og ta› ger Tórshavnar Kommuna heldur ikki. Politiskt arbei›i er at planleggja og finna skilagó›ar loysnir sum tæna borgarunum sum heild, í samtí›ini og framyvir.

Vilt tú hava ein ábyrgdarfullan b‡ráslim, fari eg sta›iliga at bi›ja um tín stu›ul 21. november.

Menniskja› í mi›depulin

Vi› einstaka borgaranum í mi›deplinum fer Javna›arlistin í Vágs bygdará› at føra ein politikk, sum setur trivna›in og vælfer›ina í hásæti›.

Okkara fremsta mi› og mál er, at í Vágs kommunu skal vera gott at búleikast hjá øllum borgarum.

Vit fara at leggja dent á at tryggja borgarunum jøvn demokratisk rættindi og menna tær kommunalu tænasturnar.

Fyri at náa hesum málum er brúk fyri politikarum, sum bæ›i duga og tora at taka upp dagsins mál, samstundis sum hugbur›urin um ta› gó›a samfelagi› ikki ver›ur mistur burtur.

Vit fara at virka fyri at

- gera ta› liviligari hjá borgarunum vi› stø›ugt at lækka skattaprosenti›
- gera ta› liviligari hjá familjum vi› børnum
- hækka barnafrádráttin
- barnagar›ur ver›ur settur á stovn

Øll størri arbei›i hjá kommuni ver›a bjó›a› út, so mest fæst fyri borgarans skattapening

Havnaútbyggingin skal fremjast so

- vinnuvirki vi› havnina sleppa at byggja út
- størri skip sleppa til bryggju – landi› skal luttaka í hesi útbygging

Eitt blómandi vinnulív og nógv arbei›spláss, er ein lívstreyt, men kanningar vísa, at skal ein kommuna vaksa og fólk trívast, so er ney›ugt, at lokalsamfelagi› t. v. s. kommunan hevur nøkur tilbo› at bjó›a borgaranum.

Tí skal dentur ver›a lagdur á at stu›la allari mennandi mentan í kommuni, bæ›i ítrótt, tónleik, leiklist,myndlist o.a.

Fari› fjølment á væl og velji› ein sterkan Javna›arlista til b‡rá›svali›

Jónleif Augustinussen, bakari

Páll Augustinussen, skrivstovuma›ur

Kirstin Strøm Bech, lærarinna

Elitha Hjelm, húsmó›ir
Marius Kjærbæk, lærari
Petur Ludvig, bilførari
Ey›finn Mørk, bilførari
Átli Poulsen, sjóma›ur
Torkil Strøm, maskinmeistari
Esther Su›uroy, lesandi
Niclas Thomassen, arbei›sma›ur

X vi› lista C

ítróttur

Nr. 224 • týsdagur • 21. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

VÍF framvegis flúgvandi

Síða 19

Vit skulu vita, hvar vit flóta

Landsliðsvenjarin hjá manslandsliðnum í hondbólti, Palli Joensen, er komin væl áleiðis við fyrireikingunum, og hóast onkrar trupulleikar og einstøk avboð, so er hann spentur um komandi uppgávurnar

HONDBÓLTSLANDSLIÐ
Jákup Mørk

Nú tað av álvara er farið at stunda til fyrstu landsliðsuppgávurnar hjá A-landsliðnum hjá monnum, eru fyrireikingarnar sjálvsagt komnar nakað áleiðis.

Sjálvir kundi landsliðsvenjarin, Palli Joensen, tó ynskt sær, at hesar vóru komnar longu áleiðis, men trupulleikar av meira tekniskum slag hava forðað fyri hesum.

–Vit byrjaðu við venjingunum í oktober mánaði, men tíverri hava vit ikki fingið vant nóg nógv hesa tíðina. Orsøkin til hetta er fyrst og fremst, at tað hevur verið sera trupult at fáa venjingartímar.

Longri kappingarár

Spurdur um tað í so máta vildi veri ein hjálp, at hondbóltskappinging varð longd, svarar hann, at tað hevði tað helst verið.

– Tað hevði so í øllum førum loyst nakrar praktiskar trupulleikar hjá okkum. Í løtuni er kappingin somikið kroyst, at tað ofta kann verða sera torført at fáa rúm fyri landsliðsvenjingum, so á tí økinum hevði tað avgjørt verið betri.

Hinvegin vísur Palli Joensen eisini á, at tað kann vera ein vandi, um hond- og fótbótslandskappingarnar yvirlappa hvørja aðra.

– Tað er í øllum førum tað einasta argumentið fyri ikki at leingja kappingina, sigur hann.

Hann er tó samdur í, at fyri flestar av leikarunum er í dag galdandi, at teir ikki hava stundir til at royna seg í bestu røðini í bæði hond- og fótbólti, og at árinini av eini longdari kappingin tí ikki vildu so ógvuslig, sum tey høvdu verið fyri fáum árum síðani.

– Teir flestu fótbóltsspælararnir, sum eisini spæla hondbólt, eru á onkrum liði í aðru ella triðju deild, so tað vildi kanska rakt meint í hesum deildunum. Hinvegin er tað so eisini ein spurningur, um hetta skal vera avgerandi fyri, hvørt kappingin verður longd ella ikki.



– Tað er náttúrligt, at onkur spælari fellur frá, tí hann ikki hevur stundir til landsliðshondbólt, sigur Palli Joensen

Mynd: Álvur Haraldsen

Ov nógva tíð

Annars hava landsliðsleikararnir fyri kortum fingið eitt yvirlit frá venjarnum fyri komandi tíðina, og einki er at taka seg aftur í, at talan er um nógvar tímar.

Somikið nógvar, at venjarin longu nú hevur fingið onkur avboð, tí menn ikki hava sæð sær stundir til at nýta somikið nógva tíð upp á hondbóltin. Í løtuni er sostatt greitt, at hvørki Jónleif Sólsker ella Anfinn N. Debess verða við á landsliðnum, tá kokmandi dystirnir skulu leikast.

– Tað er eisini náttúrligt, at onkur fellur frá, tí sum spælari verður man noyddur at velja, um man vil vera við ella ikki. Bæði Jónleif og Anfinn eru familjumenn, og tí er støða teirra væl skiljandi. Tað nyttar heldur einki, um farið verður til venjing við ringari samvitsku hvørja ferð, og tá kemur heldur ikki tað burtur úr venjingunum, sum tað annars vildi gjørt, sigur venjarin.

Spælararnir fíggja ferðina

Hetta fram til jóla koma landsliðsleikararnir at venja einar fimm ferðir hvørja viku, og harumframt skulu dstir eisini leikast, so at talan er um nógva tíð, sum verður nýtt til ítrivið, er eingin sum helst ivi um.

Millum jól og nýggjár verur talan harumframt um eina venjingarlegu, tá landsliðið fer til Danmarkar.

Palli greiðir frá, at í hesum sambandi hava spælararnir sjálvir gingið við til at finna sær hvør sín stuðul, soleiðis at hesir við eini ávísari krónuupphædæd eru við til at rinda kostnaðin av ferðini.

Sjálvur sigur Palli, at hann er fegin um at spælararnir sýna slíkan vilja at gera nakað fyri landsliðið.

– Tað er neyðugt hjá okkum at fáa venjingardystir móti sterkari mótstøðu, og hesum hava vit ikki møguleika fyri her heima.

Hvørjir dystir skulu leikast á venjingarleguni er ikki fastlagt enn, men í øllum førum verður talan um okkurt danskt 1. deildarlið, og møguliga eisini eisini onkrum liga-liði.

Vita hvar vit flóta

Tá tosið so fellur inn á komandi dystirnar, tykist venjarin vera heldur ivasamur.

– Eg eri væl vitandi um, at tað er nakrar sera truplar uppgávur, sum standa fyri framman, men sjálvandi eri eg eisini spentur. Ikki minst fyri at vita, hvar vit flóta í altjóða høpi, sæð í mun til okkara støði, tá vit luttóku í C-HM kappingunum. Nú er tað tó ikki talan um C-HM kappingar, og hesi liðini eru helst sterkari enn so.

Føroyar skulu í januar mánaði spæla ímóti Rumena, Sveis og Litava. Fyrstu dystirnir verða móti Rumenia. Teir verða 5 januar í Havn og 7. januar í Vestmanna.

Sigursrøðin hjá OB steðgað

Hvørki Óli Johannesen ella Johan B. Hansen vóru á vøllinum sunnudagin, tá Brøndby staðfesti, at teir eiga besta liðið í Danmark

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Tað hevur regnað óvanliga nógv í Europa í heyst, og sunnudagurin var einki undantak í so máta. Í Haderslev var besti fótbóltsvøllurin meiri átøkur einum runudýki, enn einum undirlagi, sum skuldi brúkast til polerað fótbóltsspæl.

OB, sum hevði vunnið tríggjar sigrar á rað, og sum rættuliga var komið við í stríðið um oddasessirnar, vitjaði. Heldur ikki hesa ferð var pláss fyri føroyska landsliðsmanninum, Johan B. Hansen, á liðnum.

Haderslev vann 4-2, og hetta var fyrsti sigurin hjá teimum nakrantíð í superliguni. Teir sýndu avgjørt rætta hugburðin, og sjálvt um OB kom á odda, so var tað al ikki óuppiborið, at botnproppurin hevði øll stigini eftir í Suðurjyllandi. Tað líkaði spælarnum, tað líkaði áskoðarunum, og tað er altíð stuttligt hjá pressuni at skriva um eina sensatión.

Drama í Viborg

Dagarnir hjá Óla Johannesen á besta liðnum tykjast vera taldir. AGF, sum hevur havt undanvind síðstu vikurnar vitjaði í Viborg, og heldur ikki hesa ferð var pláss fyri Óla Johannesen á liðnum. Nú er bara eitt umfar eftir, áðrenn danska kappingin fer í vetrarfrí – komandi vikuskifti fær AGF vitjan av Silkeborg – og á nýggjárinum fer Óli Johannesen í starv hjá Peter Schmeichel og Hvidovre.

Í Danmark verður roknað við, at tað als ikki er óhugsandi, at tað í hesum kappingarárinum fer at eydnast Viborg at vinna fyrsta meistaraskapin. Sunnudagin vístu teir, at tað skal roknast við teimum. Málverjin – pólverjin Arek Onyszsko – og fremsti álopsspælarin – hann eitur Heine Fernandez – høvdu givið avboð, tí teir vóru sjúkir, men alíkavæl vann heimaliðið 4-2. Fleiri av málunum vóru fótbóltsligar perlur.

AGF venjarin, Ove Christensen, varð vístur út á áskoðaraplássini, tá hansara lið hevði javnað til 1-1. Tað varð hann, tí hann mótmælti so harðliga, at málskjúttin, Peter Degn, hevði fingið gula kortið fyri at vanvirða áskoðararnar hjá mótstøðuliðnum. Stutt undan leikloki var sami maðurin rikin av vøllinum, tí hann enn eina ferð hevði fingið gula kortið.

Brøndby best

Brøndby er oddalið í Danmark. Teir eru so mikið frammanfyri øll hini liðini, at tað longu nú er greitt, at teir eisini verða fremstir, tá kappingin eftir komandi vikuskifti fer í vetrarfrí.

Sunnudagin høvdu teir vitjan av AaB, og har var eingin ivi. Brøndby vann 2-0, og teir kundu havt vunnið uppaftur meiri.

Í Silkeborg vann heimaliðið 3-1 ímóti Lyngby. Málini hjá heimaliðnum vórðu skorað í 18., 23. og 27. minutti. Eftir steðgin slapp Lyngby upp í part, men teir fingu bara eitt mál. Tað kom tíggju minuttir eftir hvíldina.